# Vágs Býráð stuðlar útlendingum

**Eitt útlendskt húski í Vági eigur í hvussu so er at fáa loyvi at vera í Føroyum, til børnini eru liðug í skúlanum, heldur Vágs Býráð**

ÚTLENDINGAMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Vágs Býráð er nú eisini farið upp í røðina av teimum, sum harmast um viðferðina, sum útlendingar fáa í Føroyum.

Tí hevur býráðið nú heitt á innlendismálaráðið um at viðgera eina umsókn frá einum útlendskum húski í Vági við vælvild.

Talan er um Cieslewicz-húskið, sum er ættað úr Póllandi, men sum hevur verið í Føroyum í eini sjey ár, harav eini fimm-seks tey seinastu árini í Vági.

Tað hevur fyrr verið frammi í fjølmiðlunum, at tað eru nú næstan tvey ár síðani, at tey søktu um at fáa uppihalds- og arbeiðsloyvið í Føroyum endurnýggjað, men enn er onki svar komið.

Húskið hevur ein drong, sum gongur í 9. flokki í Vági og Vágs Býráð heldur, at tá ið støða verður tikin til umsóknina, eigur tað eisini at verða hugsað um barnið.

Tí hevur býráðið nú heitt á Innlendismálaráðið um at lata húskið sleppa at vera í Vági til barnið er liðugt í skúlanum.

Vit halda ikki, at tað kann vera rætt at taka eitt barn úr skúlanum, stutt áðrenn skúlagongdin er liðug og vísa tí av landinum og sostatt eisini undir eina púra fremmanda skúlaskipan. Tí halda vit, at tað er rættast, at barnið sleppur at gera eina samanhangandi skúlagongd lidnað í Føroyum, sigur Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági.



*- Hetta er ikki rímilig viðferð at geva fólki, serliga ikki, tá ið børn eru uppi í, sigur Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri í Vági*

Húskið, vit tosa um, hevur verið í Vági í mong ár. Her hava tey arbeitt og her hava tey goldið skatt og annars tillagað seg samfelagið. Tey hava passað seg og síni, uttan at vit hava havt nakrar trupulleikar av teimum.

Men bæði tey vaksnu og drongurin, kenna seg ógvuliga ótrygg við støðuna, tí at tey ikki fáa svar og eg haldi ikki, at tað er ein rímilig støða at seta vaksin, og serliga børn, í, leggur borgarstjórin afturat. Vit eiga heilt avgjørt at hugsa um, at eisini eru børn uppi í, sigur hon.

Føroyingar eru allastaðni í verðini og kunnu vera alla staðni í verðini og tí eiga vit at hugsa okkum um, hvussu vit bera okkum at ímóti teimum útlendinum, sum eru í Føroyum, førdu býráðslimir í Vági fram.


Starvslýsing www.runavik.fo



## Sosialráðgevi

**til Eysturoyar barnaverndartænastu**

Eitt starv sum sosialráðgevi í Eysturoyar Barnaverndartænastu er leyst at søkja til setan 1. mars 2005.

**Um Eysturoyar barnaverndartænastu**
Eysturoyar barnaverndartænasta fevnir um Nes, Sjóvar, Runavíkar, Gøtu og Funnings kommunu. Í samstarvsøkinum eru 7.061 íbúgvar harav 2.077 eru undir 18 ár. Uppgávan hjá barnaverndartænastuni er at tryggja børnum, ið liva undir viðurskiftum ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, neyðuga hjálp og umsorgan.

Umsitingarliga er Eysturoyar barnaverndartænasta eind undir Sosialu deild í Runavíkar kommunu.

**Starvið**
Tú kemur, í tøttum samstarvi við sosialdeildarleiðaran, at taka tær av einum spennandi og fjøltáttaðum øki við málsviðgerð, ráðgeving og øðrum uppgávum sum Barnaverndarumsitingin tekur sær av.

**Arbeiðsuppgávan umfatar m.a.**
- at fyrireika mál til nevndarviðgerð
- at ráðgeva og vegleiða barna- og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- at ráðgeva barnaverndini í barnaforsorgarlógini
- at seta í verk og fylgja upp fyriskipanir
- at virka sum samskipari í málum har fleiri myndugleikar eru við
- at samstarva tvørfakligt
- at arbeiða fyribyrgjandi í samstarvi við fakpersónar og stovnar á barna- og ungdómsøkinum

**Vit leita eftir starvsfelaga, ið**
- er útbúgvin sosialráðgevi ella hevur aðra viðkomandi miðallanga útbúgving
- hevur royndir sum málsviðgeri ella aðrar viðkomandi royndir
- hevur áhuga og evnir at arbeiða við barna og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- megnar at vera nágreiniligur og samstundis hava nógvar bóltar í luftini
- hevur gott yvirlit og dugir væl at orða seg

**Vit bjóða tær**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, har tú kann vera við til at uppbyggja og menna Eysturoyar barnaverndartænastu frá grundini. Góðar møguleikar fyri førleikamenning, tí kommunurnar saman við Barnaverndarstovu Føroya miðvíst arbeiða við at menna umsitingarliga førleikan.

**Setanarviðurskifti**
Starvið, sum er fulltíðarstarv, verður sett skjótast gjørligt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara á telefon 417000.

**Søk starvið**
Við at senda okkum eina umsókn í seinasta lagi 27. januar 2006 kl. 12.00.

**Umsóknin skal sendst til:**
Runavíkar Kommunu
Heiðavegur 26
Postboks 139
FO-600 Saltangará

FØROYAPRENT · TEL. 314 555

**Eysturoyar Barnaverndartænasta**


## Høgni Lisberg í Keypmannhavn



Leygarkvøldid 14. januar fer fløguaktuelli Høgni Lisberg at spæla á Skarvinum í Keypmannahavn. Hetta er fyrsta konsertin hjá unga leirvíkinginum síðan fløgan Morning Dew kom út.

Við sær á pallin hevur Høgni gittarleikaran Allan Tausen. Teir báðir undirhalda frá miðnátt til kl. 2 við løgum av báðum fløgunum hjá Høgna. Aftan á konsertina er plátuvendari vid fjølbroyttum tónleiki. Tað er ókeypis atgongd.


**HANDILSLÆRLINGUR**

Vit sóknast eftir handilslærlingi til handil okkara.

Skrivlig umsókn ynskist.

**Kaj Andreasen & Co**
BREKKUTÚN 7 · POSTBOKS 1200 · 188 HOYVÍK · TEL 31 56 00

Sosialurin 341800